2024




# Ársfrágreiðing 2024

Rættindafelagsskapurin FJØLRIT

MARS 2025

FJØLRIT
- røkir føroysk listarættindi

# Um Fjølrit

Fjølrit er meginfelag hjá feløgum, sum umboða rættindahavar, tá ið verk, vard av lógini um upphavsrætt, verða nýtt.

Brúk merkir øll endurgeving - ljósriting, avriting, fjølriting, talgilding og onnur margfalding av vardum verkum, tað veri seg við framførslu, útgávu ella framleiðslu, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniðið verkið er skapt ella er til taks.

Peningurin, sum Fjølrit fær inn, fer útaftur til rættindahavarar, sum eiga verkini. Fjølrit leggur dent á, at nýtt mentanarligt tilfar verður skapað í Føroyum. Hetta nevna vit eina mentanarliga ringrás, ið fær høvundar og listafólk annars at menna føroysku mentanina. Fjølrit hevur sum felagskapur onki sjálvstøðugt fíggjarligt endamál.

## Limafeløg

Hesi feløg eru limir í Fjølriti, og tað eru hesar listagreinar, Fjølrit umboðar:
- Rithøvundafelag Føroya
- Føroysk tónaskøld
- Føroysk myndlistafólk
- Føroyskir yrkisfotografar
- Føroysk bókaforløg
- Føroya miðlafólk

## Umboðsráðið

Hvørt limafelag tilnevnir eitt umboð og eitt varaumboð í umboðsráðið.

Umboðsráðið skal:
- gera av, hvussu Fjølrit skal virka
- velja stjórnina
- hava eftirlit við arbeiði stjórnarinnar
- eftir uppskot frá stjórnin gera reglugerð um handfaring av viðurløgum

## Lóg um upphavsrætt

Fjølrit hevur loyvi frá Mentamálaráðnum at virka sum rættindafelagskapur, í samsvari við § 40, stk 1 í løgtingslóg um upphavsrætt.

## Stjórnin og daglig umsiting

Stjórnin er mannað soleiðis:
- Helle Thede Johansen, forfólk
- Kim Simonsen, skrivari
- Beinir Bergsson, kassameistari

Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, aðalskrivari, og Símun Petur Venned, KT-mennari, taka sær av dagligu umsitingini. Jónas Tór Næs er knýttur at Fjølriti sum løgfrøðiligur ráðgevi. Jákup Samuelsen er bókhaldari.

Samband fæst við at senda teldupost til post@fjoelrit.fo ella ringja 23 86 00 ella 23 86 01.

# Ársfrágreiðin fyri árið 2024

til aðalfundin 24. Mars 2025

Árið 2024 hevur á mangan hátt kenst sum ein nýggj byrjan. Fyri tað fyrsta fekk Fjølrit 1. apríl 2024 longt sítt loyvi at virka sum felagsskapur hjá rættindahavum, sambært lógini um upphavsrætt. Síðan hevur verið arbeitt við at endurskoða og endurnýggja verandi avtalur, soleiðis at tær verða meira tíðarhóskandi, samstundis sum møguleikar at gera nýggjar avtalur og at fara undir nýtt virksemi hava verið kannaðir og í onkrum føri troyttir. Ein av hesum møguleikum er fylgirættarviðurlagið, sum listafólk hava rætt til at fáa, tá ið verk teirra verða endurseld, og aðrir eru at gera avtalur innan nýggj øki sum Fólkakirkjuna og Máltøknidepilin. Nógv altjóða samskifti hevur verið um, hvussu vitlíki ávirkar møguleikarnar at gera avtalur. Vit hava eisini brúkt fitt av orku upp á at finna betri og meira tíðarhóskandi loysnir fyri, hvussu brúkið undir verandi avtalum verður skrásett, soleiðis at tað verður lættari at rinda út viðurløg. Alt í alt eitt hendingaríkt ár, við spennandi nýggjum avbjóðingum.

*Hoyringar*
Vit hava havt 4 kunngerðir um bókasavnsgjald til hoyringar frá AMMR í februar 2024.

*Fyrispurningar*
Fjølrit hevur fingið fleiri fyrispurningar frá feløgum og stovnum, sum hava fingið rokning fyri nýtslu av myndatilfari, sum er vart av upphavsrætti. Tey spyrja um ráð.

**Avtalur**
*Loyvið at virka*
Loyvið at virka sum upphavsrættarfelagsskapur í Føroyum, sambært §40 stk. 1 í Løgtingslóg um upphavsrætt, varð endurnýggjað í februar 2024 og er tað galdandi fram til 31. mars 2029.

Eingin avtala um viðurlag varð annars endurnýggjað í 2024, og eingin nýggj avtala varð undirskrivað, hóast ætlanir vóru um hetta við árslok 2023.

*Kringvarp Føroya*
Dagførd avtala við Kringvarp Føroya varð klár at undirskriva við árslok 2024, men kom hon ikki undir land fyrr enn í februar 2025.

*Kommunurnar*
Samráðingar hava verið við Kommunufelag Føroya líka síðani apríl 2023. Undirvísingarstýrið kom seinni við í samráðingarnar, eftir ynski frá Kommunufelagnum. Fleiri fundir hava verið í 2024 hesum viðvíkjandi, og partarnir eru vorðnir samdir um ein leist, sum umfatar alla skúlaskipanina, og løgfrøðingurin hjá Fjølriti er í løtuni í ferð við at snikka til eina avtalu til partarnar at taka støðu til heilt skjótt.

*Mentamálaráð og hægri útbúgvingar*
Verandi avtala um viðurløg varð undirskrivað við Almanna- og Mentamálaráðið, men í 2023 varð málsøkið "hægri útbúgvingar" flutt inn undir Barna- og Undirvísingamálaráðið (BUMR). Avtalan um viðurløg í sambandi við nýtslu á hægri útbúgvingarstovnum eigur tí helst at gerast við hetta nýggja ráðið ella stovn, sum hevur fingið heimild at gera tað, so sum Undirvísingastýrið. Samstundis eigur avtalan at verða dagførd. Arbeitt verður í løtuni við hesum, sum partur av einari avtalu, sum umfatar allar skúlaskipanina, frá barnaskúla til Fróðskaparsetur (sí brotið framman fyri).

*Máltøknidepilin*
Umboð fyri Fjølriti vóru 13. mars 2024 á fundi við Máltøknidepilin fyri at fáa kunning um teirra arbeiði, og fyri at hoyra, í hvønn mun tey nýta upphavsrættarvart tilfar, og um tey hava loyvi til tess. Máltøknidepilin ynskir at gera eina avtalu, og vilja fegin hava nøkur tøl fyri, hvat tað kann hugsast at koma at kosta teimum. Okkum tørvar neyvari og meira ítøkiligar upplýsingar um ætlaða virksemið hjá Máltøknideplinum, skulu vit kunna rokna út eitt uppskot um viðurlag. Vit arbeiða enn við málinum, og millum annað kanna vit, hvussu gjørt verður í øðrum londum. Ein av ósvaraðu spurn-

ingunum er framvegis, um vit hava heimild til at gera avtalu um slíkt brúk.

*Ljóðbókatænastan*
Nýggja bókasavnalógin kom í gildi 1. januar 2024. Ljóðbókatænastan ger beinleiðis avtalur við rættindahavar. Fjølrit verður ikki partur í hesum, uttan so, at limir okkara koma við beinleiðis áheitan.

*Málmót*
Øll viðurskifti tykjast at vera í lagi. Tað tykist ikki at vera neyðugt at gera avtalu.

*Aðrar avtalur*
Ætlanin fyri 2024 var millum annað at gera avtalur um nýtslu við Fólkakirkjuna, við listasøvn, landssøvn og Máltøknidepilin. Hóast arbeitt hevur verið við at kanna hesar møguleikarnar nærri, og einstakir fundir hava verið, hevur tað ikki verið orka til at koma undir land við nøkrum av hesum avtalum.

**Innkomin Peningur**
Avtalan við Uttanríkis- og mentamálaráðið fevndi í 2024 um teir somu 10 stovnarnar sambært fíggjarlógini, og allar rokningarnar vórðu rindaðar stundisliga. Inn komu kr. 998.734,70. Hetta er ein lækking í mun til árið fyri, sum kemst av, at færri næmingar vóru.

Rokningar vórðu sendar teimum 27 kommununum, við avtalu fyri skúlaárið 2023/24 á kr. 1.490.400,00. Talan er um 7452 fólkaskúlanæmingar á kr. 200. Allar rokningarnar eru avgreiddar. Hetta er ein hækking í mun til árið fyri, sum stavar frá, at talið av næmingum er hækkað.

Uppgerð frá Kringvarpinum verður latin ársfjórðingin afturút, og inngjaldingarnar í 2024 fevna sostatt um 4. ársfjórðing 2023 og 1., 2. og 3. ársfjórðing í 2024. Inn komu kr. 272.820,24. Hetta er ein lækking í mun til árið fyri, sum kemur av, at Kringvarpið sendi minni tilfar, sum er fevnt av avtaluni, enn árið fyri.

**Skrásettir rættindahavarar**
Í 2024 skrásettu 31 nýggir rættindahavar seg hjá Fjølrit. Sostatt eru nú tilsamans 321 skrásettir rættindahavarar. Av hesum eru 6 feløg. Allir skrásettu rættindahavararnir eru føddir fyri ár 2000.

**Nýtsluhagtøl**
*Nýtslukanningar í fólkaskúlanum*
Fjølrit hevur seinastu árini gjørt nýtslukanningar á øllum fólkaskúlnum í landinum. Hagtølini hava verið ófullfíggjað, og tí hevur verið arbeitt við at gera ein nýggjan hátt at kanna brúkið, har eitt tal av skúlum verða útvaldir á hvørjum ári. Í hesum arbeiði hava vit fingið størri innlit í, hvussu arbeitt verður úti á skúlunum, og í løtuni kanna vit tí ein heilt nýggjan leist fyri at savna inn upplýsingar, sum ikki er royndur áður. Av hesum sama hevur ongin nýtslukanning verið síðan 2023, og tann parturin av viðurløgunum, sum skuldu verið útgoldin eftir avtaluni við kommunurnar í 2023 og 2024, verður tí goldin út nú 2025.

*Undirvísingafrágreiðingar frá Miðnámi*
Gjøgnumgongdin av undirvísingarfrágreiðingunum frá miðnámsskúlunum hevur verið rættiliga tíðarkrevjandi, og tí verður í løtuni arbeitt við at minimera arbeiðið, sum krevst, fyri at fáa brúkilig dáta at gjalda út eftir. Símun Petur hevur eisini tosað við Glasir um, at tey skulu menna ein standardleist fyri, hvussu undirvísingafrágreiðingarnar skulu fyllast út, fyri at lætta um arbeiðið hjá okkum.

*Upplýsingar frá Fróðskaparsetrinum*
Við tí endamál at fáa meira nágreiniligar upplýsingar um brúk, hava vit nú gjørt avtalu við Setrið um, at vit fáa eitt sokallað DUMP úr teirra skipan Moodle, har undirvísingartilfar verður deilt. Í september 2024 fingu vit eitt DUMP frá aftur í august 2021 og fram til august 2024. Vit eru í gongd við at sortera hetta rúgvismikla tilfarið, og fara so undir at skráseta tað, soleiðis at tað væntandi kann brúkast sum grundarlag fyri útgjaldi longu frá í ár.

**Útgjald**
Eftir avtaluni við Kringvarp Føroya, vórðu í 2024 settar av kr. 248.018,39 til útgjald. Av hesum vórðu kr. 198.820,31 goldnar út eftir skrásettari nýtslu til 34 rættindahavarar. Goldið verður út fýra ferðir árliga, og tá rættindahavari skrásetur seg.

Eftir avtaluni við kommunurnar eru settar av kr. 893.184,94 til útgjald, fyri nýtslu í skúlaárinum 21/22. Enn er ikki framt útgjald fyri hendan pening vegna ónøktandi góðsku í svarum til spurna-

kanning í heyst 2024. Arbeitt verður við alternativum leisti fyri innsavnan av upplýsingum til individuelt útgjald fyri brúk innan avtaluøkið hjá kommununum. Av tí at arbeitt enn verður við hesum er ikki vist hvussu stórur partur av teimum 893.184,94 kr. verður settur av til individuelt útgjald.

Eftir avtaluni við Mentamálaráðið eru kr. 543.615,06 kr. settar av til útgjald fyri nýtslu í skúlaárinum 20/21. Eisini innan hetta avtaluøkið er ikki enn vist hvussu stórur partur verður settur av til individuelt útgjald. Hetta tí at vit, útyvir tær vanligu upplýsingar frá miðnámsskúlnum, hava móttikið upplýsingar um brúk frá Fróðskaparsetur Føroya á ein nýggjan hátt. Hetta fer óivað at hækka støddina á partinum sum verður avsettur til individuelt útgjald, sum áður hevur verið 50%. Útgoldið varð í 2024 tvær ferðir eftir fráboðan. Upphæddirnar komu frá fyrnaðum peningi frá øllum avtalum.

Fyrra umfar var útgoldið upphædd áljóðandi 450.000 kr. 206 góðkendar fráboðanir vóru, og upphæddin fyri hvørja varð sostatt 2.184,46 kr. Annað umfar var útgoldið upphædd áljóðandi 490.141,29 kr. 208 góðkendar fráboðanir vóru. Í hesum umfarið var nýggjur útgjaldsleistur funnin. Fyrst og fremst var avsett 25% at gjalda út til forløg, í samsvar við viðtøkur Fjølrits um útgjald av viðurløgum. Harafturat var gjørd ein meting av verkunum, sum vóru brúkt í umsóknini. Hesi vóru deild í heildarverk (4 lutir) og stakverk (1 lutur) eftir meting av støddini av verkinum. Hvør lutur fyri einstaklingar bleiv áljóðandi 629,46 kr. meðan hvør lutur fyri forløg bleiv 790,55 kr. Útgoldið varð til 98 rættindahavarar.

Sambært lóg um upphavsrætt § 43, fyrnar viðurlag fyri nýtslu av vardum verkum 3 ár frá ársenda av tí árinum, tá ið verkið varð nýtt. Ger rættindahavari ikki vart við seg innan hesa freist, ger Fjølrit sum góðkendur felagsskpur av, hvussu hesi viðurløg skulu nýtast. 31. desember 2024 fyrndust kr. 511.492,20, sum hava staðið avsettar til rættindahavarar fyri nýtslu fyri 31. desember 2021.

**Tiltøk og fundir**

*Umsitingin*
Stjórn og starvsfólk avtalaðu í fjør at skipa fundirnar øðrvísi. Hetta fyri at leysgeva meira orku til starvsfólkini. Ætlanin var, at stjórnin einans skuldi hittast annan hvønn mánað, um ikki okkurt átroðkandi stakk seg upp. Hinar mánaðarnir skuldi forkvinnan hava arbeiðsfundir við starvsfólkini, og annars javnan hava samband við teir.

*Níggju stjórnarfundir* vórðu hildnir: 9. januar, 5. mars, 2. apríl, 4. apríl, 1. mai, 6. juni, 8. aug., 19. september og 20. november 2024.

*13 arbeiðsfundir* vórðu hildnir: 16. & 23. januar, 14. februar, 12. mars, 10. apríl, 22. mai, 20. juni, 28. august, 25. september, 2. oktober, 30. oktober, 27. november og 18. desember 2024.

*Árligi Norðurlendski stórfundurin*, tá allir rættindahavarafelagsskapir í Norðurlondum hittast, varð í 2024 hildin í Keypmannahavn, 12.-14. juni. Símun Petur og Arnbjørn luttóku.

*Árliga ráðstevnan* hjá europeisku deildini í altjóða upphavsrættarsambandinum IFRRO varð hildin í Valencia 27.- 2. mai 2024. Kim og Símun Petur luttóku.

*Árligi Norðurlendski statistikkfundurin*, har serliga KT-fólk, hagtalsfólk og skrásetarar hjá rættindahavafelagsskapum í Norðurlondum hittast, var í Helsinki 25.-26. apríl 2024. Símun Petur luttók.

*Ársfundur og -ráðstevna* hjá altjóða upphavsrættarsambandinum IFRRO varð hildin í Quebec, Canada, 30. september-3. oktober 2024. Stjórnin gjørdi av ikki at senda nakað umboð til hendan fundin.

*Umboðsráðsfundur* varð hildin 23. mai 2024, eftir áheitan, um býtið av puljum. Umboðið, sum ynskti málið á skrá, møtti ikki. Einans umboð fyri Rithøvundafelag Føroysk og Føroysk tónaskøld møttu. Fundurin var tí ikki viðtøkuførur.

*Árligu læraradagarnir* í Norðurlandahúsinum, sum Nám skipar fyri, og sum vit vanliga luttaka á, vórðu ikki fyriskipaðir í 2024.

*Árligu bókadagarnir* vórðu hildnir í Norðurlandahúsinum 15. – 17. november 2024. Evnið var "Sosial ábyrgd". Stjórnin avgjørdi tískil aftur at vísa familjufilmin "Coco", ið millum annað snýr seg um upphavsrættindi.

*Útnorðurdagur 2024: Ráðstevna um vitlíki:*
Norðurlandahúsið, NORA og Uttanríkis- og vinnumálaráðið skipaði fyri tiltaki 23. Sept. Í Norðurlandahúsinum. Tiltakið snúði seg um støðuna viðvíkjandi vitlíki í Føroyum við framløgum frá Gunnleygi Clementsen úr Tøkni Tænastuni, Iben Nyholm Debess úr Máltøknidepilinum og Lilju Dögg Jónsdóttir – stjóra fyri Íslendsku máltøkni miðstøðina. Símun Petur luttók vegna Fjølrit.

*Tiltak um falstíðindi og upphavsrætt*
Kringvarp Føroya skipaði fyri einum almennum tiltaki í Norðurlandahúsinum í oktober 2024. Stjórnin gjørdi av at stuðla við 50.000 kr., av tí at tiltakið eisini skuldi snúgva seg um upphavsrætt og falstíðindi. Tiltakið endaði tó við í høvuðsheitum at snúgva seg um børn og nýstlu av skermi. Eitt gott endamál, men ikki tað, sum var endamálið. Avtalað er tí við Kringvarp Føroya, at Fjølrit kortini ikki stuðlar tiltakinum.

*Nordisk Ophavsretsymposium* var í Danmark 26.-27. september 2024. Av tí at hesin fundur mest var ætlað løgfrøðingum, valdi stjórnin at bjóða okkara løgfrøðingi, Jónas Tór Næs, at fara, og hann tók av. Tíverri fekk hann í síðstu løtu forfall, og so fór Símun Petur í staðin. Úr Føroyum luttók eisini Torkil Rasmussen frá AMMR.

*Aðrir fundir*
Afturat hesum hevur Arnbjørn verður á samskiftisfundi í Helsinki, saman við hini norðurlendsku feløgunum, umframt at hann hevur luttikið í CEO fundum við somu, online og í Helsinki í desember.

Eisini hevur Arnbjørn verið á fundi við Copydan Tekst & Node í februar, har millum annað varð tosað um avtalur við søvn, skeiðsdeplir, kirkjur og samkomur.

**Talgildisbúgving – Fjølnám**
Steðgur er komin í verkætlanina við lærupallinum FjølNám. Orsøkin er, at arbeitt nú verður við øðrum møguleikum og mátum at savna inn upplýsingar um brúk av vardum tilfari, enn tí, sum lærupallurin FjølNám stuðlar undir. Enn er støða ikki tikin til, um nýggir hættir heilt fara at avloysa nýtslukanningarnar, sum hava verið, og tí heldur ikki, um FjølNám heilt verður slept. Miðað verður eftir, at ein støða verður tikin um hetta í árinum 2025.

**Ætlanir 2025**
Ein felags avtala við kommunurnar og Undirvísingarstýrið er ávegis, og er tað okkara ætlan, at hon verður undirskrivað áðrenn summarfrítíðina 2025.

Arbeitt verður framhaldandi við at gera avtalu um nýtslu av tilfari í føroyskum fólkakirkjunum.

Eisini verður hugt eftir møguleikum at gera avtalur innan onnur øki, sum ikki eru fevnd av verandi avtalum, eitt nú almenna fyrisitingin, bókasøvn, skeiðsdeplar og onnur.

Dagførd avtala við Kringvarp Føroya varð undirskrivað 6. februar 2025. Ein ískoytisavtala um nýtslu av myndatilfar skal orðast skjótast tilber.

*Fylgirættargjald – Myndlist*
Sambært §38 í lóg um upphavsrætt, hevur upphavsmaður rætt til fylgirættargjald, tá ið eintak av listaverki hansara verður endurselt.

Faroe Law /Jónas Tór Næs hevur okkara vegna orðað eitt skriv, sum vit sendu gallaríum o.l. í oktober 2024, og eisini løgdu á heimasíðuna.

Samstundis varð biðið um at fáa eitt yvirlit yvir søluna trý tey seinastu árini, soleiðis sum lógin ásetur. Tað hava í hesum sambandi verið nógvir spurningar frá gallaríunum.

Arbeitt verður víðari við at samskifta við tey, sum keypa og selja listaverk, um skyldu teirra at boða frá, hvat tey keypa og selja, og at tryggja, at listafólk fáa tað viðurlag, tey hava rætt til.

**Samstarv og menning**
Eftir ætlan fara stjórn og starvsfólk aftur í 2025 at taka lut á viðkomandi fundum og ráðstevnum í Føroyum eins og uttanlands. Tað er mennandi at skifta orð og hoyra um tær royndir, hini feløgini

hava gjørt sær, og vit hava øll gagn av at deila okkara vitan. Ansað verður tó eftir, at felagið ikki ferðast og luttekur á fundum uttanlands, uttan tá mett verður, at Fjølrit fær okkurt burturúr at luttaka.

Norðurlendskur stórfundur verður í Oslo 12.-13. juni, og statistikkfundur og kommunikatiónsfundur verða í Stockholm 24.-25. apríl. IFRRO-fundirnir verða í Luxemburg 19.-21. mai og í Singapore 27.-30. oktober. Støða er ikki enn tikin til, um Fjølrit hevur fyri neyðini at luttaka á hesum báðum fundunum.

Ætlanin er aftur í 2025 at luttaka á bæði lærara-døgunum (um teir verða) og á bókadøgunum.

Orka fer eisini í 2025 at verða løgd í støðugt at menna og einfalda skipanir og mannagongdir, so at tað verður so smidligt og einfalt sum til ber fyri bæði brúkarar og rættindahavarar at umsita avtalur og viðurløg.

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Fjølrit

**Postsmoga 62, 110 Tórshavn**

## Ársfrásøgn

## 2024

**FRUMRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann /

______________________

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit

| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2024** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 7 |
| Rakstrarroknskapur | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Notur | 10 |

## Leiðsluátekning

Stjórnin hevur í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2024 hjá Fjølrit.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við føroyska lóggávu og viðtøkur fyri felagið.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2024 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2024.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 18. mars 2025

**Stjórn**

| | | |
|---|---|---|
| Helle Thede Johansen<br>forkvinna | Kim Simonsen<br>skrivari | Beinir Bergsson<br>kassameistari |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

### Til leiðsluna í Fjølrit

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Fjølrit fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2024 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur sambært galdandni lóggávu og viðtøkum hjá Fjølrit.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2024 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2024 samsvarandi galdandi lóggávu og viðtøkum Fjølrits.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

### Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir galdandi lóggávu og viðtøkur felagsins eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í galdandi lóggávu og viðtøkur felagsins. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 18. mars 2025

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

John Michal Petersen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Fjølrit<br>Postsmoga 62<br>110 Tórshavn | |
| | Heimasíða: | www.fjoelrit.fo |
| | V-tal: | 429198 |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Stjórn** | Helle Thede Johansen, forkvinna<br>Kim Simonsen, skrivari<br>Beinir Bergsson, kassameistari | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

## Leiðslufrágreiðing

### Virksemi

Virksemi Fjølritar er at gera sáttmálar við brúkarar um viðurlag fyri brúk av teimum sløgum av verkum, sum limir limafelaganna skapa; at krevja inn og býta út viðurløg, at fáa til vegar upplýsingar til at styrkja grundarlagið undir viðurlagskrøvum mest møguligt; at veita feløgum hjá útlendskum rættindahavarum viðurløg fyri brúk av teirra verkum í Føroyum og frá hesum at taka ímóti viðurløgum fyri brúk av føroyskum verkum uttanlands, og støðugt at upplýsa brúkarar og rættindahavarar um møguleikar og rættindi teirra.

Fjølrit er góðkendur felagsskapur sambært § 40, stk. 1 í løgtingslóg nr. 30 fra 30. apríl 2015 um upphavsrætt (hereftir nevnd upphavsrættarlógin) og umboðar rættindahavarar í sambandi við øll sløg av endurgeving, ljósriting, avriting, fjølriting ella onnur margfalding av vardum verkum, tað veri seg í framførslu, útgávu ella framleiðslu, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniði verkið er/verður skapt ella er til taks.

Í løtuni eru hesi feløgini limir í Fjølrit: Rithøvundafelag Føroya, Felagið Føroysk Tónaskøld, Føroyskir Yrkisfotografar, Føroysk Bókaforløg, Føroysk Miðlafólk og Føroysk Myndlistafólk. Í avtaluhøpi umboðar Fjølrit allar rættindahavarar innan hesi øki.

Fjølrit hevur sum felagsskapur einki fíggjarligt endamál.

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Fjølrit er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki A.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum (DKK).

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Rakstrarroknskapurin

**Nettoinntøka**

Nettoinntøka umfatar viðurløg fyri nýtslu av upphavsrættarliga vardum verkum.

**Útgoldin viðurløg**

Útgoldin viðurløg umfatar útgoldin viðurløg til rættindahavara at verkunum.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, hølir og tap av áognarum.

**Starvsfólkakostnaðir**

Starvsfólkakostnaðir umfata løn, íroknað frítíðarløn og eftirløn, umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

### Fíggjarstøðan

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

**Skuld**

Onnur skuld verður tikin við til amortiseraða útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2024<br>kr. | 2023<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| | Nettoinntøka | 2.761.955 | 2.801 |
| | Útgoldin viðurløg | -1.413.840 | -1.553 |
| | Aðrir uttanhýsis kostnaðir | -250.713 | -269 |
| | **Bruttoúrslit** | **1.097.402** | **979** |
| 1 | Starvsfólkakostnaðir | -890.204 | -827 |
| | **Ársúrslit** | **207.198** | **152** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | 2024 | 2023 |
|---|---|---|
| Flytast til flutt úrslit | 207.198 | 152 |
| **Býtt tilsamans** | **207.198** | **152** |

# Fíggjarstøða 31. desember

## OGN

| Nota | | 2024 kr. | 2023 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Ogn í umferð** | | |
| 2 | Áogn | 11.000 | 20 |
| | Áogn tilsamans | 11.000 | 20 |
| | Tøkur peningur | 6.046.554 | 5.869 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **6.057.554** | **5.889** |
| | **OGN TILSAMANS** | **6.057.554** | **5.889** |

## SKYLDUR

| Nota | | 2024 kr. | 2023 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 3 | Flutt úrslit | 6.057.554 | 5.850 |
| | **Eginogn tilsamans** | **6.057.554** | **5.850** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 0 | 26 |
| | Onnur skuld | 0 | 13 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 0 | 39 |
| | **Skuld tilsamans** | **0** | **39** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **6.057.554** | **5.889** |

| | | 2024<br>kr. | 2023<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Starvsfólkakostnaðir** | | |
| | Lønir | 740.431 | 688 |
| | Eftirlønir | 112.685 | 104 |
| | Onnur almenn gjøld | 37.088 | 35 |
| | | **890.204** | **827** |
| | Nevnd | 30.560 | 39 |
| **2.** | **Áogn** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 11.000 | 20 |
| | | **11.000** | **20** |
| **3.** | **Flutt úrslit** | | |
| | Flutt úrslit primo | 5.850.356 | 5.698 |
| | Flutt úrslit í árinum | 207.198 | 152 |
| | | **6.057.554** | **5.850** |

# ÁRSROKNSKAPUR 2024

| Nr. | RAKSTRARROKNSKAPUR | Tíðarskeiðið | Árið fyri (2023) | Árið fyri (2022) |
|---|---|---|---|---|
| | **Inntøkur** | | | |
| 1040 | Inntøka sambært avtalu MMR | -998.734,70 | -1.039.224,55 | -900.987,80 |
| 1041 | Inntøka sambært avtalu Kommunar | -1.490.400,00 | -1.450.200,00 | -1.436.800,00 |
| 1042 | Inntøka sambært avtalu Kvf | -272.820,24 | -313.737,86 | -268.702,61 |
| 1043 | Inntøka frá stovnum | 0,00 | 0,00 | 0,00 |
| | **Inntøkur íalt** | **-2.761.954,94** | **-2.803.162,41** | **-2.606.490,41** |
| | **Umsitingarútreiðslur** | | | |
| 2210 | Lønir | 784.390,50 | 742.407,50 | 606.902,54 |
| 2211 | Frítíðalønir | 11.765,89 | 11.136,23 | 13.160,37 |
| 2213 | Nevndarsamsýning | 30.559,50 | 38.613,12 | 28.379,52 |
| 2222 | ArbeiðsMarknaðarEftirlønarGrunnurin | 23.288,00 | 21.449,00 | 17.791,00 |
| 2223 | Arbeiðsloysisskipanin | 6.365,00 | 6.794,00 | 3.677,00 |
| 2224 | Barsilsgrunnurin | 7.435,00 | 6.846,00 | 5.674,00 |
| 2230 | KM-peningur | 0,00 | 264,96 | 0,00 |
| 2241 | Starvsfólkakostn./útbúgv. vm | 1.455,00 | 22.152,18 | 441,41 |
| 2750 | Matstovu/umboðan | 4.937,00 | 3.147,50 | 9.007,65 |
| 2754 | Gávur og blómar | 660,00 | 2.097,95 | 2.250,00 |
| 2770 | Ferðing og umboðan | 112.111,32 | 100.334,10 | 65.127,52 |
| 2800 | Kunning, marknaðarføring & rættlestur | 5.675,00 | 8.787,50 | 15.839,70 |
| 2811 | Tiltøk | 100.000,00 | 0,00 | 0,00 |
| 3411 | Húsaleiga | 14.332,54 | 13.026,60 | 12.960,33 |
| 3600 | Skrivstovu útr. pappír vm | 1.675,95 | 3.385,00 | 3.305,90 |
| 3604 | Edv og skipanir | 27.442,99 | 19.278,74 | 16.842,88 |
| 3617 | Smærri innkeyp (teldu, printari vm) | 0,00 | 7.647,80 | 26.336,11 |
| 3620 | Telefon | 7.569,25 | 6.404,75 | 3.575,35 |
| 3628 | Bankakostnaðir | 2.034,00 | 2.543,00 | 2.085,98 |
| 3640 | Grannskoðari | 10.500,00 | 10.000,00 | 7.500,00 |
| 3645 | Advokatur | 54.843,75 | 37.187,50 | 12.500,00 |
| 3647 | Bókhald | 26.400,00 | 26.400,00 | 25.920,00 |
| 3661 | Yrkisbókmentir | 0,00 | 1.638,00 | 0,00 |
| 3663 | Limagjald IFRRO | 7.475,67 | 6.319,74 | 6.296,14 |
| 3664 | Web-hotel og domæni | 0,00 | 0,00 | 0,00 |
| 3720 | Tap av skuldarum | 0,00 | 0,00 | 0,00 |
| 4410 | Rentuútreiðslur, banki | 0,00 | 0,00 | 25.802,10 |
| | **Útreiðslur samantalt** | **1.240.916,36** | **1.097.861,17** | **911.375,50** |
| | Rakstrarúrslit | -1.521.038,58 | -1.705.301,24 | -1.695.114,91 |
| | Umsitingarpartur í % | 44,93 | 39,17 | 34,97 |

Viðmerkingar

**Konto 2811**: upphæddin er játtan til stuðul til nýggja skipan við rithøvundavitjanum, sum Føroyar Lesa og Rithøvundafelag Føroya fóru undir lestrarárið 2023/24. Her er ikki talan um umsitingar-/rakstrarútreiðslur, men um ein annan hátt at rinda út viðurløg (partur av fyrndu viðurløgunum)

**Konto 3604**: hækkingin stavar serliga frá 1) gjaldi fyri at sleppa at vísa filmin "Coco" tvær ferðir á bókadøgunum, og 2) nýggjum haldi av Microsoft Office 365

| Nr. | | Tíðarskeiðið | Árið fyri (2023) | Árið fyri (2022) |
|---|---|---|---|---|
| | **Beinleiðis útreiðslur (viðurløg)** | | | |
| 1350 | Útg. nýtslugjøld undir MMR | 563.503,58 | 384.902,71 | 213.614,54 |
| 1351 | Útg. nýtslugjøld frá Kommunum | 470.844,33 | 816.002,10 | 596.191,99 |
| 1352 | Útg. nýtslugjøld frá Kringvarp Føroya | 279.492,48 | 352.356,30 | 198.849,31 |
| | **Beinleiðis útreiðslur samantalt** | **1.313.840,39** | **1.553.261,11** | **1.008.655,84** |

# UMSITING 2024

| *Viðmerkingar* | **Umsitingarútreiðslur** | **2024** | **2023** | **2022** | **2021** |
|---|---|---|---|---|---|
| | Starvsfólkaútreiðslur samantaldar | 865.258,89 | 849.662,99 | 676.025,84 | 582.422,11 |
| | Ferðing og marknaðarførsla samantalt | 223.383,32 | 114.367,05 | 92.224,87 | 10.889,30 |
| | Hølisútreiðslur samantaldar | 14.332,54 | 13.026,00 | 12.960,00 | 12.837,50 |
| | Umsitingarútreiðslur samantaldar | 137.941,61 | 120.804,53 | 104.362,36 | 108.142,48 |
| | Rentuútreiðslur samantaldar | 0,00 | 0,00 | 25.802,10 | 31.749,13 |
| | **Samantalt** | **1.240.916,36** | **1.097.860,57** | **911.375,17** | **746.040,52** |
| | | | | | |
| | **Sett av til umsiting (fast umsitingargjald)** | | | | |
| *Avtalufest* | 10 % umsiting frá KVF | 27.282,02 | 31.373,79 | 26.870,26 | 37.644,88 |
| *Avgjørt á* | 20 % av 2014-17 pengum frá MMR, tá ið teir eru fyrndi | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 26.666,60 |
| | **Samantalt** | **27.282,02** | **31.373,79** | **26.870,26** | **64.311,48** |
| | | | | | |
| | **Eftir í umsitingargjald til kommunurnar og MMR** | 1.213.634,34 | 1.066.486,78 | 884.504,91 | 681.729,04 |
| | | | | | |
| | **Innkomi frá avtalum, ið umsiting skal roknast fyri** | | | | |
| | Uttanríkis- og Mentamálaráðið | 998.734,70 | 1.039.224,55 | 900.987,80 | 1.063.425,70 |
| | Kommunurnar | 1.490.000,00 | 1.450.200,00 | 1.436.800,00 | 1.396.200,00 |
| | Barnabati | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 150,00 |
| | **Samantalt** | **2.488.734,70** | **2.489.424,55** | **2.337.787,80** | **2.459.775,70** |
| | | | | | |
| | **Umsitingargjald í prosentum** | **48,77** | **42,84** | **37,84** | **27,72** |
| | | | | | |
| | Umsitingargjald í krónum frá avtalu | | | | |
| | Uttanríkis- og Mentamálaráðið | 487.034,13 | 445.211,02 | 340.889,85 | 294.729,39 |
| | Kommunurnar | 726.600,21 | 621.275,76 | 543.615,06 | 386.958,08 |
| | Barnabati | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 41,57 |
| | | | | | |
| | At gjalda rættindahavum (før. og útl.) eftir avtalu | | | | |
| | Uttanríkis- og Mentamálaráðið | 511.700,57 | 594.013,53 | 560.097,95 | 768.696,31 |
| | Kommunurnar | 763.399,79 | 828.924,24 | 893.184,94 | 1.009.241,92 |
| | Barnabati | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 108,43 |

# FÍGGJARÆTLAN 2025

| Nr. | RAKSTRARROKNSKAPUR | FÆ 2025 | 2024 | FÆ 2024 | 2023 | FÆ 2023 | 2022 | FÆ 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Inntøkur** | | | | | | | | |
| 1040 | Inntøka sambært avtalu MMR | -1.100.000,00 | -998.734,70 | -1.200.000,00 | -1.039.224,55 | -1.000.000 | -900.987,80 | -1.000.000 | -1.063.425,70 |
| 1041 | Inntøka sambært avtalu Kommunar | -1.500.000,00 | -1.490.400,00 | -1.600.000,00 | -1.450.200,00 | -1.500.000 | -1.436.800,00 | -1.400.000 | -1.396.200,00 |
| 1042 | Inntøka sambært avtalu Kvf | -300.000,00 | -272.820,24 | -400.000,00 | -313.737,86 | -300.000 | -268.702,61 | -375.000 | -414.097,39 |
| 1043 | Inntøka frá stovnum | -100.000,00 | 0,00 | -100.000,00 | 0,00 | -150 | 0,00 | -150 | -150,00 |
| | **Inntøkur íalt** | **-3.000.000** | **-2.761.955** | **-3.300.000** | **-2.803.162** | **-2.800.150** | **-2.606.490,41** | **-2.775.150** | **-2.873.873,09** |
| | | | | | | | | | |
| | **Beinleiðis útreiðslur (viðurløg)** | | | | | | | | |
| 1350 | Útg. nýtslugjøld undir MMR | 500.000,00 | 563.503,58 | 500.000,00 | 384.902,71 | 300.000 | 213.614,54 | 600.000 | 332.901,51 |
| 1351 | Útg. nýtslugjøld frá Kommununum | 1.200.000,00 | 470.844,33 | 1.200.000,00 | 816.002,10 | 800.000 | 596.191,99 | 800.000 | 854.228,47 |
| 1352 | Útg. nýtslugjøld frá Kringvarp Føroya | 350.000,00 | 279.492,48 | 350.000,00 | 352.356,30 | 300.000 | 198.849,31 | 300.000 | 345.991,83 |
| 1353 | Útg. nýtslugjøld frá stovnum | 50000 | 0 | 50000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | **Beinleiðis útreiðslur samantalt** | **2.100.000** | **1.313.840** | **2.100.000** | **1.553.261** | **1.400.000** | **1.008.655,84** | **1.700.000** | **1.533.121,81** |
| | | | | | | | | | |
| | **Umsitingarútreiðslur** | | | | | | | | |
| 2210 | Lønir | 800.000,00 | 784.390,50 | 800.000,00 | 742.407,50 | 660.000 | 606.902,54 | 550.000 | 519.779,03 |
| 2211 | Frítíðalønir | 13.000,00 | 11.765,89 | 13.000,00 | 11.136,23 | 14.000 | 13.160,37 | 9.000 | 8.844,01 |
| 2213 | Nevndarsamsýning | 50.000,00 | 30.559,50 | 50.000,00 | 38.613,12 | 25.000 | 28.379,52 | 25.000 | 19.448,78 |
| 2222 | ArbeiðsMarknaðarEftirlønarGrunnurin | 25.000,00 | 23.288,00 | 25.000,00 | 21.449,00 | 25.000 | 17.791,00 | 20.000 | 17.018,00 |
| 2223 | Arbeiðsloysisskipanin | 10.000,00 | 6.365,00 | 10.000,00 | 6.794,00 | 8.000 | 3.677,00 | 6.500 | 5.868,00 |
| 2224 | Barsilsgrunnurin | 8.000,00 | 7.435,00 | 8.000,00 | 6.846,00 | 8.000 | 5.674,00 | 6.000 | 5.312,00 |
| 2230 | KM-peningur | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 264,96 | 0 | 0,00 | 0 | 0,00 |
| 2241 | Starvsfólkakostn./útbúgv. vm | 5.000,00 | 1.455,00 | 5.000,00 | 22.152,18 | 0 | 441,41 | 10.000 | 6.152,29 |
| 2750 | Matstovu/umboðan | 5.000,00 | 4.937,00 | 5.000,00 | 3.147,50 | 10.000 | 9.007,65 | 13.000 | 1.919,30 |
| 2754 | Gávur og blómar | 2.000,00 | 660,00 | 2.000,00 | 2.097,95 | 1.000 | 2.250,00 | 1.000 | 1.512,00 |
| 2770 | Ferðing og umboðan | 100.000,00 | 112.111,32 | 75.000,00 | 100.334,10 | 50.000 | 65.127,52 | 50.000 | 0,00 |
| 2800 | Kunning, marknaðarføring & rættlestur | 12.000,00 | 5.675,00 | 12.000,00 | 8.787,50 | 10.000 | 15.839,70 | 10.000 | 7.458,00 |
| 2811 | Tiltøk | 5.000,00 | 100.000,00 | 5.000,00 | 0,00 | 5.000 | 0,00 | 10.000 | 0,00 |
| 3411 | Húsaleiga | 15.000,00 | 14.332,54 | 13.200,00 | 13.026,60 | 13.000 | 12.960,33 | 13.000 | 12.837,50 |
| 3600 | Skrivstovu útr. pappír vm | 3.500,00 | 1.675,95 | 3.500,00 | 3.385,00 | 2.000 | 3.305,90 | 2.000 | 2.468,58 |
| 3604 | Edv og skipanir | 24.000,00 | 24.102,99 | 20.000,00 | 19.278,74 | 18.000 | 16.842,88 | 18.000 | 15.735,90 |
| 3617 | Smærri innkeyp (teldu, printari vm) | 10.000,00 | 0,00 | 10.000,00 | 7.647,80 | 10.000 | 26.336,11 | 5.000 | 0,00 |
| 3620 | Telefon | 8.000,00 | 7.569,25 | 6.000,00 | 6.404,75 | 4.000 | 3.575,35 | 4.000 | 3.735,50 |
| 3628 | Bankakostnaðir | 3.000,00 | 2.034,00 | 3.000,00 | 2.543,00 | 3.000 | 2.085,98 | 3.000 | 2.532,00 |
| 3640 | Grannskoðari | 10.000,00 | 10.500,00 | 10.000,00 | 10.000,00 | 8.000 | 7.500,00 | 8.000 | 7.500,00 |
| 3645 | Advokatur | 50.000,00 | 54.843,75 | 50.000,00 | 37.187,50 | 40.000 | 12.500,00 | 40.000 | 25.000,00 |
| 3647 | Bókhald | 28.000,00 | 26.400,00 | 28.000,00 | 26.400,00 | 30.000 | 25.920,00 | 30.000 | 25.680,00 |
| 3661 | Yrkisbókmentir | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 1.638,00 | 0 | 0,00 | 2.000 | 994,36 |
| 3663 | Limagjald IFRRO | 7.500,00 | 7.475,67 | 6.500,00 | 6.319,74 | 6.500 | 6.296,14 | 6.500 | 6.296,14 |
| 3664 | Web-hotel og domæni | 0,00 | 3.340,00 | 0,00 | 0,00 | 0 | 0,00 | 0 | 0,00 |
| 3720 | Tap av skuldarum | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 0 | 0,00 | 0 | 18.200,00 |
| 4410 | Rentuútreiðslur, banki | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 25.000 | 25.802,10 | 23.000 | 31.749,13 |
| | **Útreiðslur samantalt** | 1.194.000 | 1.240.916 | 1.160.200 | 1.097.861 | 975.500 | **911.375,50** | 865.000 | **746.040,52** |
| | | | | | | | | | |
| | Rakstrarúrslit | -1.806.000,00 | -1.521.038,58 | -2.139.800,00 | -1.705.301,24 | | -1.695.114,91 | | -2.127.832,57 |
| | | | | | | | | | |
| | Umsitingarpartur í % | 39,80 | 44,93 | 35,16 | 39,17 | 34,84 | 34,97 | 31,17 | 25,96 |

# Val 2024

Av sitandi stjórn stillaðu Helle Thede Johansen og Beinir Bergsson uppaftur og vórðu afturvald. Nýggjur limur í stjórnini varð Kim Simonsen. Sum varalimir vórðu valdir Jonhard Mikkelsen og Oddfríður M. Rasmussen. Ole Wich stillaði uppaftur sum formaður í umboðsráðnum og varð afturvaldur, meðan Sunrid í Gong varð vald til næstforkvinnu.

### Stjórnin

**Helle Thede Johansen**
forfólk

**Kim Simonsen**
næstforfólk

**Beinir Bergsson**
skrivari

**Jonhard Mikkelsen**
varalimur

**Oddfríður M Rasmussen**
varalimur

### Umboðsráðið

**Ole Wich**
formaður

**Sunrid í Gong**
næstforkvinna

**Oddfríður M. Rasmussen**
umboðsráðslimur

**Kristian Blak**
umboðsráðslimur

**Jón Brian Hvidtfeldt**
umboðsráðslimur

**Jonhard Mikkelsen**
umboðsráðslimur

### Limafeløg

**Føroysk myndlistafólk**

**Føroyskir yrkisfotografar**

**Rithøvundafelag Føroya**

**Føroysk tónaskøld**

**Føroysk miðlafólk**

**Føroysk bókaforløg**

### Grannskoðari

**Január**
Løggilt grannskoðanarvirki

FJØLRIT

- tryggjar burðardyggu listaringrásina

**Fjølrit** • postsmoga 62 • FO-110 Tórshavn
www.fjoelrit.fo • tel + 298 238600 og 238601
post@fjoelrit.fo • v-tal 429198

**Útgevari:** Fjølrit
**Myndir:** Fjølrit og Helle Thede Johansen
**Sniðgivið og sett upp:** Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð og Helle Thede Johansen
**Útgávuár:** 2025

Endurnýtsla úr blaðnum er bert loyvt við skrivligum loyvi